# Harðari revsing fyri barnaporno

**Ein samd rættarnevnd tekur undir við at broyta revsilógina, so hon gevur misnýttum børnum betri verju, og somuleiðis verður tað ólógligt at hava barnaporno í varðveitslu**

REVSILÓGARBROYTING
*Magnus Dam*

Uppskotið hjá Katrini Dahl Jacobsen fekk góða móttøku í Løgtinginum, tá tað var til 1. viðgerð í fjør, og líkt er til, at tað verður samtykt uttan trupulleikar.

Katrin Dahl Jacobsen skjýtur upp at dagføra revsilógina, so hon samsvarar við donsku lógina á økinum. Rættarnevndin hevur viðgjørt uppskotið, og í álitinum, sum varð lagt fyri Løgtingið í gjár, sæst, at allir limirnir taka undir við uppskotinum. Danska Løgmálaráðið hevur somuleiðis hugt at uppskotinum og hevði ongar viðmerkingar til tað.

## Longri fyrningarfreist

Ein av broytingunum í lógini er, at fyrningarfreistin í málum um kynsliga misnýtslu verður 10 ár frá tí degi, at barnið fyllir 18 ár. Sum er, er fyrningarfreistin eisini 10 ár, men hon er galdandi frá tí degi, lógarbrotið er framt. Hetta ber í sær, at mál ofta gerast ov gomul, tí tann, sum hevur verið fyri ágangi, ikki kemur fram við tí, sum er hent, fyrrenn tað er ov seint.



*Alt bendir á, at lógaruppskotið hjá Katrin Dahl Jacobsen um at geva misnýttum børnum í Føroyum betri verju, verður samtykt*

Nýggja revsilógin herðir eisini reglurnar um barnapornografi munandi. Í dag er tað ikki ólógligt at liggja inni við tílíkum tilfari, men tað verður tað við nýggju lógini. Tað verður heldur ikki loyvt um internetið ella á nakran annan hátt at lata øðrum pornografiskt tilfar við børnum undir 18 ár. Revsingin fyri slík lógarbrot verður eisini herd, so tey nú kunnu geva upp til 2 ára fongulsrevsing.

Fólkatingið broytti revsilógina í fjør, og tað eru hesar broytingarnar, sum Katrin Dahl Jacobsen vil hava inn í føroysku lóggávuna. Og líkt er altso til, at ein meiriluti í Løgtinginum tekur undir við at broyta lógina.

# Strandferðslan skal útjavna prísirnar

**Sambandsflokkurin mælir til, at prísurin fyri at ferðast við strandfaraskipunum verður tann sami á øllum sjóvegis farleiðum. 30 krónur fyri ferðafólk og 80 krónur fyri bilar**

FERÐASEÐLAPRÍSIR
*Magnus Dam*

Sambandsflokkurin roynir nú at útjavna prísirnar við strandfaraskipunum, so tað kostar tað sama at ferðast við øllum skipunum hjá Strandferðsluni.

Flemming Mikkelsen skjýtur upp, at prísurin verður 30 krónur fyri ferðafólk og 80 krónur fyri bilar. Endamálið við uppskotinum er at gera tað bíligari hjá mykinesfólki og suðringum at ferðast. Sum er kostar tað 30 krónur at ferðast við øllum skipum hjá Strandferðsluni uttan við Smyrli og Súluni. Ein ferðaseðil við Smyrli kostar 80 krónur og við Súluni kostar hann 60 krónur. At fáa ein persónbil um Suðuroyarfjørð kostar 120 krónur, meðan tað kostar 80 krónur á hinum farleiðunum.

## Kostar 4 milliónir

Tað fer at kosta Strandfaraskipum Landsins 4 milliónir krónur í mistari inntøku, um prísurin á øllum farleiðum verður tann sami, metir Flemming Mikkelsen. Hann roknar tó við, at fleiri fólk fara at ferðast, um prísirnir verða lækkaðir, og tá verður útreiðslan hjá Strand-ferðsluni og sostatt landskassanum minni. Sambandsflokkurin heldur, at talan verður um eina hart tiltrongda ábót fyri tey, sum ferðast um Suðuroyar- og Mykinesfjørð.

– Somuleiðis vil ein samtykt av hesum uppskoti geva til kennar ein vilja frá Løgtinginum at fremja ein politikk, sum styrkir um útjaðaran, sigur Flemming Mikkelsen í viðmerkingunum.

Sambandsflokkurin royndi seg í mars í fjør við hesum sama uppskotinum, men tá var ikki meiriluti fyri tí í Løgtinginum. 14 tingmenn atkvøddu tá fyri uppskotinum, meðan 17 vóru ímóti.



*Stendur tað til Sambandsflokkin, skal prísurin fyri at ferðast við strandfaraskipum verða tann sami á øllum farleiðum*

## Einki kannað

Samgonguumboðini í vinnunevndini tóku sum heild undir við tankanum um sama prís á øllum farleiðum, men tey hildu, at spurningurin um brúkaragjøld innan alt tað almenna samferðslukervið átti at verið tikin upp til polit-iska viðgerð. Tí tóku tey ikki undir við uppskotinum. Umboðini hjá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum tóku undir við uppskotinum.

Nú eitt gott ár er farið, síðani upskotið seinast var í løgtinginum, er einki hent á hesum økinum, vísir Flemming Mikkelsen á. Hann sigur eisini, at Strandfaraskip Landsins heldur ikki hevur nakra ætlan um at útjavna prísirnar á sjóvegis farleiðunum. Tí roynir hann seg nú aftur við sama uppskoti.



Havnarmeistarin í Havn:

# Smyril skapar dagliga vanda

**Strandfaraskipið Smyril brýtur dagliga reglugerðina fyri Tórshavnar Havn, tá hann við nógvari ferð kemur inn um Molan. Sambært havnarmeistaranum var ov nógv ferð eisini orsøkin til, at hann mundi rent saman við einum russa týsmorgunin**

ÓSKETNI
*John Johannessen*

Hevði skiparin á Smyrli havt minni ferð á, tá hann týsmorgunin kom inn um Molan, hevði hann ikki komið í vanda fyri saman-stoyti týsmorgunin.

Hetta er niðurstøðan hjá Jónsvein Lamhauge, havnarmeistara í Havn, eftir at hann hevur kannað tilburðin seinasta týsmorgun, tá Smyril mundi rent saman við einum russiskum trolara.

Tá Smyril nærkaðist molanum við 72 ferðafólkum umborð og skuldi til at sneiða inn um, kom brádliga ein russiskur trolari undan Norrönu, sum lá ytst við Molan. Trolarin sneiddi beint út fyri Smyril, sum hevði nógva ferð á, og hevði skiparin á Smyrli ikki borið seg skjótt at og sligið bakk, hevði túrurin helst endað við eini vanlukku.

## Skapa sjálvir vandan

Pauli Larsen, skipari á Smyrli, gav í Sosialinum í gjár havnarmyndugleikunum í Havn skuldina fyri, at Smyril kom í vanda. Hann segði, at tað javnan hendir, at havnarskrivstovan letur skip loysa, so tey koma beint út fyri Smyril.

Skiparin á Smyrli greiddi frá, at vanligt er í havnum uttanlands, at havnarskrivstovan syrgir fyri, at ferðamannaskip og ferjur ikki verða tarnað av ferðslu, sum annars kann bíða. Og hann vísti eisini á, at Smyril einki fekk at vita um, at eitt skip var á veg út úr havnini á somu kós, sum Smyril var á veg inn.

Men Jónsvein Lamhauge, havnarmeistari, vísir ákærunum frá skiparanum á Smyrli aftur.

– Vit hava ikki áhuga í at senda skip út fyri Smyril, og tað gera vit heldur ikki. Vit royna ofta at lata Smyril fáa fyrimun. Men Smyril skal kortini halda seg til somu reglur, sum onnur skip, ger Jónsvein Lamhauge greitt.

Havnarstjórin vísir í hesum sambandi á, at eingin vandi hevði staðist týsmorgunin, um Smyril helt galdandi reglur fyri Tórshavnar Havn og sigldi við hóskandi ferð inn í havnina.

– Tað er greitt tilskilað á stórum skelti á endanum av Molanum, at hámarksferðin er 4 míl, men Smyril siglir nógv skjótari enn hetta, og tí seta skipararnir dagliga ferðafólkini og onnur ferðandi í havnini í vanda, sigur Jónsvein Lamhauge.

Hendan trupulleika hevur havnarskrivstovan fleiri ferðir gjørt Standfaraskip Landsins vart við, men higartil hevur tað ikki hjálpt. Skipini sigla enn inn í havnina við alt ov nógvari ferð.



*Havnarskrivstovan í Havn sær dagliga Smyril og onnur strandfaraskip koma inn um Molan við alt ov nógvari ferð. Ov nógv ferð var eisini tað, sum var orsøkin til, at Smyril mundi rent á ein russiskan trolara týsmorgunin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Kundu samskift betur

Pauli Larsen, sum var skipari á Smyrli týsmorgunin, tá hann mundi rent á, fíltist í Sosialinum í gjár á, at hann ikki fekk at vita frá havnarskrivstovuni, at eitt skip var á veg út úr havnini á somu kós sum Smyril.

Hetta tekur Jónsvein Lamhauge, havnarmeistari til eftirtektar.

– Vit skuldu helst havt sagt Smyrli frá, at eitt skip var á veg út. Tað er jú vantandi samskifti, sum ofta er orsøk til óhapp. Men hinvegin, so var sýnið av tí besta týsmorgunin, og tí hevði als eingin vandi staðist, um Smyril sigldi hóvliga inn um molan. Tað ber ikki til at siga, at fólk skulu skunda sær til flogrutuna, tí skundur má ikki koma fram um trygdina, sigur Jónsvein Lamhauge.

# Helena verður reinsað



*Avgerðin um at seta ein kommunulækna afturat á Eiði varð longu tikin í fjør. Tí var ikki talan um valagn undan formansvalinum í Sjálvstýrisflokkinum*

**Avgerðin um at seta ein kommunulækna á Eiði varð tikin í oktober í fjør. Tí fer løgmaður helst ikki at ákæra Helenu Dam á Neystabø fyri at hava misnýtt sítt embæti sum landsstýrismaður fyri at gerast formaður Sjálvstýrisfloksins**

EMBÆTISMISNÝTSLA
*John Johannessen*

Helena Dam á Neystabø misnýtti ikki sítt embæti fyri at verða vald til formann í Sjálvstýrisflokkinum, sum annars hevur ljóðað seinastu dagarnar.

Ivin um embætisførsluna hjá Helenu Dam á Neystabø tók seg upp, tá Jógvan Mørkøre, bygdaráðsformaður í Hósvík og fyrrverandi javnaðarmaður, í segði fyri Útvarpinum á middegi týsdagin, at hann á fundi hjá Sjálvstýrisflokkinum leygardagin hevði atkvøtt fyri Helenu Dam á Neystabø sum formanni, tí hon afturfyri hevði sett kommunulækna á Eiði nakrar dagar frammanundan.

Hetta fekk løgmann til at fara og kannað embætisførsluna hjá Helnu Dam á Neystabø, tí hetta skapti illgruna um, at Helena Dam á Neystabø hevði misnýtt landsstýrissessin fyri at náa formanssessinum í Sjálvstýrisflokkinum.

Men avgerðin um at seta kommunulæknan varð tikin í fjør, eftir at Kommunulæknaráðið í november í 1999 mælti landsstýrismanninum til at seta ein kommunulækna afturat á Eiði. Hetta váttaði Kommunulæknaráðið fyri Sosialinum beint áðrenn evstamark í gjár.

Anfinn Kallsberg, løgmaður tosaði fyrrapartin í gjár við Helenu Dam á Neystabø um málið, og fekk hann somu upplýsingar, sum Sosialurin hevur fingið frá Kommunulæknaráðnum.

Men fyri at tryggja sær, at alt er farið rætt fram, skulu embætisfólkini hjá løgmanni kanna skjølini í málinum, áðrenn løgmaður endaliga reinsar Helenu Dam á Neystabø.